NØVN Í VIKUNI

Ottar Jacobsen 70

Tann 7. januar varð Ottar Jacobsen, fyrrverandi skúlastjóri í Kommunuskúlanum í Havn, 70 ár. Hann tók læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1956 og var lærari í Vági fyrsta læraraárið, 1956/57. Síðani varð hann settur í starv sum lærari í Kommunuskúlanum í Havn. Árini 1970-72 var hann varaskúlastjóri. Tey seinastu 25 árini av lærarayrki sínum var hann skúlastjóri, til hann legði frá sær 1. apríl í 1997.

Ottar er sonur Hans Jacob Jacobsen úr Skálavík – Heðin Brú, rithøvund – og Katu, f. Dalsgaard, av Velbastað. Ottar er giftur Hildigunn Hákunardóttir, f. Dam.

Áramálsdagur 70 er farin afturum, men vit frættu nú í vikuni, at tey í Kommunuskúlanum í Tróndargøtu høvdu fingið kringlu, tí Ottar var 70. Neyvan hevur kringlan verið nakað eftirsløð, tvørturímóti. Eisini vit vilja fegin vera teirra millum, sum bera skúlastjóranum gamla hjartalig lukkuynski við megnarárunum 70.
Eyðkent fyri persónin Ottar var tign. Vinsælur hevur hann altíð verið, vælgjørdur, álítandi og stundisligur, tað eyðmerkti mannin. Og á ongan hátt var hann maðurin, sum troðkar seg fram, heldur tað øvugta, siga vinir um hann.

Kartni nýggjur sløkkiliðsstjóri

Í dag tekur Kartni Jacobsen við sum nýggjur sløkkiliðsstjóri í Havn. Hann tekur við eftir Peter Seloy, sum hevur røkt starvið seinastu fimm árini. Peter Seloy er farin í starv sum tilbúgvingarstjóri í Albertslund í Keypmannahavn.

Hóast Peter Seloy er dani, var mamman føroysk, úr Sørvági, og pápin hálvur føroyingur – abbasonur gamla Knút, skógmakaran í Havn.

Kartni Jacobsen er 39 ára gamal. Hann er útbúgvin bilmekanikari, og gjørdist í 1990 leysur sløkkiliðsmaður í Havn. Tá tú ert »leysur sløkkiliðsmaður«, verður tú tilkallaður, tá okkurt serligt er áfatt – tú ert ikki í føstum starvi sum sløkkiliðsmaður.

Í 1993 kom hann í fast starv sum sløkkiliðsmaður, og í 1998 gjørdist hann varðasløkkiliðsstjóri.

Kartni Jacobsen hevur alla neyðuga útbúgving og skeið til at vera sløkkiliðsstjóri, og hann er í løtuni eisini undir útbúgving til at gerast brunaumsjónarmaður.

Kartni Jacobsen er havnarmaður. Hann er sonur Poulu og Juleif Jacobsen. Hon frá Gjógv, dóttir Carl Anton og Onnu Malenu Joensen. Juleif er úr Havn, sonur Kristian úr Svínoy og Súnnvá á Morkrnesi.

Umbyggingar í SMS

HANDIL
Tíðindaskriv frá SMS

Mikudagin lat handilin hjá Demmus í SMS aftur – tó ikki med alla. Handilin verður næstu dagarnar umbygdur. Veggurin millum Demmus og 3'arin Electronic verður brotin niður, og Demmus skal í framtíðini vera ein handil í einari hædd. Tað vil siga, at harraskógvarnir nú eisini verða at finna lið um lið við damu- og barnaskógvarnar. Hetta skuldi verið við at lætta um hjá viðskiftafólkunum hjá Demmus.

3'arin electronik verður fluttur upp á loftið í 3'aranum, har fløgudeildin er nú, og fløgudeildin verður so flutt yvirum á loftið hjá Demmus. Hetta kann tykjast eitt sindur fløkjasligt, men tá umbyggingin verður liðug síðst í februar, er tað munandi lættari hjá viðskiftafólkunum at fáa yvirlit yvir bæði handlar og vørur, sigur SMS í tíðindaskrivi.

Í samband við umbyggingina í Demmus og 3'aranum Electronic, verður Demmus á Torginum frá mikudegnum 30. januar til leygardagin 23. februar

Hós-, friggja- og leygardagin verður eisini indiskur stemningur á Torginum í SMS. Tí tá fer Mango at bjóða mangt spennandi, so sum gávuhugskot og lutir til heimið. Hesar triggjar dagarnar hevur Mango eisini fleiri góð tilboð at bjóða. – Vitja Mango á Torginum í SMS, og tú fær óivað okkurt gott hugskotið og ein litríkan íblástur hesa myrku og køldu vertartíð, sigur SMS.

Ein síðsta heilsan

Mánadagin 27. januar andaðist Hansina Hentze, Tórshavn. Foreldur hennara vóru Bette, ættað úr Vestmanna, og Hans á Lag í Havn. Hansina var fødd 1. juni 1934 og var 67 ár, nú hon andaðist.

Lagnan er so ymisk, og hjá Hansinu vóru døkku træðrirnir rættuliga sjónskir í lívsvevnaðinum, og hóast so var, átti hon til síðsta andadrátt tílíka lívsvón og treysti, sum mangan undraði.

Rættuliga skjótt aftan á at Hansina var liðug við realskúlan, var hon knýtt at handlinum hjá Essaba niðast á Áarvegnum í Havn, har farbróðurin, Eilesr Jacobsen, og pápi hennara, Hans á Lag, høvdu vælumtókta klædnahandilin meginpartin av farnu øld. Í hesum vælahandli var Hansina mergurin tey mongu árini.

Við sorgblídni minnast vit hetta skeið við Hansinu sum samskiftara. Ongantíð bleiv tað ein stuttur avgreiðsluspurningur, um tað so bara var onkur knappur, sum skuldi keypast.

Nú hon hevur fingið ta hvíld og tann frið, vit halda henni londist eftir, so verður tómleikin og saknurin stórur, serliga hjá tykkum Maluni og Beintu og tykkara. Mangan hava vit undrast, at hon, blind og tarnað við svárum nýrabreki, hevði evnini og megina til at síggja tað, sum rørdi seg í samfelagnum.

Hansina misti unnusta sín, Hilbert, tá »Stella Argus« á heysti 1957 gekk burtur, og fyri 20 árum síðani doyði maður hennara, Jón, á sjúkhúsi í Fraklandi, hann sigldi úti sum maskinmeistari. Hansina sat tá eftir við døtrunum báðum Maluni og Beintu.

Góð var Hansina við síni og umsorgan hevði hon fyri teimum. Frið lýsa vit yvir minni um eina medmenniskju, sum gav so nógv frá sær, har mangur hevði hokna.

Jákup Lindenskov

Tøkk

Hjartaliga takk fyri sýnda samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

Sanna Mortensen, f. Jacobsen

andaðist og fór til gravar.

Takk til prestarnar Jónsvein Bech og Hera Joensen.
Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar, gravarar og førara av líkvogninum.
Takk til tykkum øll, sum hjálptu til.
Takk fyri blómur og kransar.
Takk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Ein serlig takk til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim fyri umsorgan tykkara tey mongu árini, hon var hjá tykkum.

Familjunnar vegna
Carl og Jákup